VINNUSÍÐURNAR



*Framhald av síðu 18*

### Khomeini kemur til, og amerikavinurin shahurin flýggjar

Í 1979 gjørdist støðan í Iran óstabil, og Shahurin Reza Palahvi, sum í sínari tíð bleiv settur inn av bretskum og amerikanskum áhugamálum, misti tamarhaldið á støðuni og flýggjaði. Heim kom Ayatolla Khomeini, sum gjørdi Iran til eina Islamiska republikk. Tá varð panikkur í USA, sum hugsaði sum orðatakið: 'har ein skriða er lopin, er onnur væntandi'. Oljuframleiðslan minkað úr 5 MTD niður í næstan onki. Einaferð enn meira enn tvífaldaðist prísurin.

Bæði nú og undir fyrru oljukreppuni royndi USA at kontrollera og seta hámarksprísir á heimamarknaðinum. Hetta ljóðaði í fyrsta umfari skilagott, men hevði fleiri negativar fylgjur. Fá tiltøk vóru til dømis sett í verk fyri at minka um nýtsluna. Teir koyrdu framvegis í stórum benzin-slúkandi bilum. Fá tiltøk vóru sett í verk, at økja um orkueffektivitetin í framleiðsluni. Tey amerikansku oljufeløgini fingu lægri prís heima enn aðrastaðir, og avlopið - sum kundi verið brúkt til at finna nýggjar keldur og nýggjan teknikk - var lítið. So tá næsta oljukreppan kom í 79-80 var USA verri fyri enn hini londini í Vesturheiminum.

**Keldur:**
Annual Statistical Bulletin (www.opec.org/publications)
A.P. Møller-Mærsk A/S: Halvårsrapport 2004
Den store Danske Encyclopædi. Gyldendal.
Oil price History and Analysis (www.wtrg.com)
J.S. Juul: Stigende oliepriser.ae-rådet, 11.6.04.

### Kríggj millum Irak og Iran 1980

Í september 1980 legði Irak við Saddam Hussein á grannalandið Iran, sum hann væntaði stóð veikt aftaná kollveltingina har. Aftanfyri stóðu helst eisini ávísar kreftir vestanfyri, sum vildu sleppa av við Khomeini aftur. Kríggið dróg út, men eingin gjørdist veruligur vinnari.

Oljuprísirnir í 80-unum førdu til búskaparliga kreppu, fallandi framleiðslu og arbeiðsloysi víðahvar, men - ikki í Føroyum. Her vóru gullash-ár við lántum pengum.

Kreppan førdi til minkandi eftirspurning eftir olju og prísirnir fóru aftur at falla, tí OPEC-londini ikki megnaðu at semjast um framleiðslukvoturnar. Lond royndu at snýta og í duldum framleiða meira enn kvota segði. Stórframleiðarin Saudi Arabia royndi at vera tað landið, sum regleraði marknaðin og prísin. Men í longdini miseydnadist tað. Saudi Arabia fór í 1985 at seta teirra oljuprísir eftir spot-marknaðinum og økti framleiðsluna úr 2 upp í 5 MTD. Prísirnir fullu, sum sæst á mynd 1, og hevur síðani ligið á einum støði, sum bert er eitt sindur hægri enn tað fyrst í 70-

*Framhald á síðu 20*